# HEILSANIR




**Góðu Durita og Rógvi**
Hjartaliga tillukku við 15 og 8 ára føðingardøgunum 11. og 12. juli.
**Bestu heilsanir mamma og babba**



Her var hesin fitti sjeikurin 10 ár, nú verður hann pipar. Hjartaliga tillukku.
**Fastir**



**Góða systi**
Vit ynskja tær hjartaliga tillukku á 50 ára føðingardegnum.
**Systi við familju**



**Góða fitta Heidi**
Hjartaliga tillukku við 6 ára føðingardegnum 11. juli. Alt tað besta verður tær ynskt í framtíðini. Nú má tú hava ein góðan føðingardag.
**Omma, abbi og langomma**
**PS.** Góða Sólbjørg, tú fær eisini eina heilsu. Tillukku 10. juli



**Góði gubbi**
Hjartaliga tillukku við 55 ára føðingardegnum tann 14. juli. Takk fyri at tú er so góður við meg.
**Ynskir Jens Kristian**



**Góða Vár og Barba**
Hjartaliga tillukku við 8 ára degnum 11. juli.
**Bestu heilsanir mamma, babba og Regin**



**Góða Durita**
Hjartaliga tillukku við útbúgvingini sum sjúkrarøktarfrøðingur við heitinum. Professións bachelor. Góða eydnu við starvinum.
**Heilsan systrarnar við maka**



**Góði besti abbi**
Vit ynskja tlær hjartaliga tillukku við føðingardegnum 14. juli.
**Kærar heilsanir Árni, Elsa, Daniel, Súsanna, Hannah, Karl og Marianna**



**John & Jensia**
Hjartaliga tillukku við 45 ára degnum í dag.
**Heilsan Leitisgøta 24**



**Góði Allan**
Hjartaliga tillukku við føðingardegnum 12. juli. Vit elska teg.
**Heilsan mamma, Bárður og Johan Eiler**



**Góða ommididd**
Eg haldi tú er so fitt. Tillukku ynski eg tær. Muss og klemm frá mær.
**Rósa Julianna**



**Góði Allan**
Hjartaliga tillukku við 8 ára føðingardegnum 12. juli. Vit gleða okkum at sleppa í føðingardag.
**Ynskja vit á Spógvavegi 12**



**Góði Allan**
Hjartaliga tillukku við 8 ára føðingardegnum. Vit gleða okkum til tú kemur aftur at vitja okkum.
**Blíðar heilsur Jórun-Maria, Anna og Jákup í Aarestrup**



Ikki hevði ein trúð, at hendan dullan verður 70 ár í dag. Takk fyri gestablídni og mangan góðan bita. Bestu ynskir um framtíð tína.
**Vit á Heygnum 7**
**PS.** Góðan túr í Svøríki



**Silvurbrúðarparið Augustinussen, Argir**
Tillukku tit bæði. Vónandi møta tit ikki soleiðis upp í kvøld. Gleða okkum til ballið.
**Vit í nr. 15**



Tann 9. apríl 2003 giftust í Vor Frelser kirke í Keypmannahavn Maja Johanne Warberg og Høgni Vilhelm Hansen

## Heilsanir

30,- kr. Sosialurin

**5 ferðir um vikuna**

### Gevið gætur

Bert heilsanir, skrivaðar á henda lepan og goldnar frammanundan við 30,- kr. fáa innivist í blaðnum. Til ber eisini at lata okkum lepan og gjald í avgreiðsluni á Argjavegi 26, millum kl. 8.00 og 16.00.

**Myndaheilsanir skulu vera okkum í hendi á miðdegi 2 dagar fyri útkomudag.** Viðmerkið annars niðanfyri, um heilsanin ynskist í blaðið ávísan dag.
❑ Týsd. ❑ Mikud. ❑ Hósd. ❑ Fríggjad. ❑Leygard.

Tekstur:..........................................................................
..........................................................................
..........................................................................
..........................................................................
..........................................................................
..........................................................................

**Myndina aftur:** Minnist til at skriva navn og bústað aftanfyri á myndina og at leggja við ein frankeraðan brævbjálva við navni og bústaði.
Um neyðugt fyri arbeiðsgongdina, taka vit okkum rætt til at fáa heilsanina í blaðið annan dag, enn tann ynskta.

Sent hevur (skal fyllast út).
Navn: ..................................................................
Bústaður: .............................................................
Bygd/býur: .................................. Tlf.: ................

Sendið lepan, mynd og gjald til:
**Sosialurin**
Postsmoga 76 •110 Tórshavn
Merkið bjálvan: »**Heilsanir**«



# TILTØK

**Gudstænastur**
Vesturkirkjan: Bergur D. Joensen kl. 11.00
Kirkjubøur: Bergur D. Joensen kl. 12.30
Havnar kirkja: Erland Beder kl. 11.00
Nólsoy: Sverri Steinhólm kl. 12.00
Hvítanes: Sonja Klein kl. 11.00
Christianskirkjan: lestur kl. 11
Klaksvíkar sjúkrahús: Niels Pauli Danielsen kl. 10.00
Viðareiði: Niels Pauli Danielsen kl. 12.00
Norðoya Røktarheim: Niels Pauli Danielsen kl. 14.30
Fríðrikskirkjan: Martin Restorff Jacobsen kl. 11.00, altargongd
Sandavágur: David Johannesen kl. 11.00
Skála: Jógvan Fríðriksson kl. 11.00, konfirmatión
Kvívík: Marjun Bæk kl. 12.00
Tjørnuvík: Mogens Tilsted Christensen kl. 11.00
Søldarfjørður: Meinhard Bjartalíð kl. 11.00 altargongd

**Adventkirkjan**
Leygardagin kl. 11.00: Barnabíbliutími og bíbliugransking. Evni: Jesus, kongur okkara.

**Hebron, Argir**
Sunnudagin er morgunmøti kl. 10.30. Súni S. Jacobsen talar. Barnaansing er samstundis.
www.hebron.fo

**Katólska kirkjan**
Hvønn gerandisdag kl. 17.30 Messa í Kerit.
Leygardag kl. 11.30 Messa í Kerit.
Sunnudag kl. 11 Hámessa við Pater Jude Kulas Soosaiappu í Mariukirkjuni.

**Samkoman Rhema**
*Staravegur 5*
Sunnudagin kl 11.00: Morgunmøti. David Bech talar á møtinum
Øll eru vælkomin
www.rhema.fo

**Filadelfia, Landavegur 22**
Í dag kl. 17.00: Landsbøn.
Sunnudagin kl. 11.00: Morgunmøti v/ Ólavi Jacobsen, kl. 18.00: Evangeliskt møti.
Mánakvøldið kl. 20.00: Bønarskúlin
www.filadelfia.fo

**Ebenezer**
Leygarkvøldið kl. 20.00: Ungdómsmøti.
Sunnudagin kl. 10.00: Breyðbróting, kl. 18.00: Evangeliskt møti, kl. 21.00: Útimøti.
Mikukvøldið kl. 20.00: Bønar- og uppbyggingarmøti. Sonni Poulsen talar.
Heimasíðan: www.ebenezer.fo

**Meinigheitshúsið**
Sunnukvøldið kl. 18.00: Møti v/ Sverra Steinhólm.

**Meinigheitin í Hoyvík uppi á Brekku 3**
Leygardagin After Eight, høllin er opin frá 13 – 15.
Sunnudagin, Guðstænasta kl 11.00 v/ Teami sum ferð til Letland, Sunnudagsskúlin er í summarfrí, lýst verður tá byrjað verður aftur. Mánakvøldið bønarmøti kl 20.30.

**Samkoman Immanuel**
Sunnudagin kl. 13.00: Sunnudagsskúli. Sunnudagin kl. 17.00: Møti.

**Tórshavnar Hvítusunnusamkoma**
*Yviri við Strond*
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti, kl. 18 Evangel. møti, øll eru vælkomin.

**Samkoman Lívdin**
*Í Hoyvíkar skúla.*
Hetta verður síðsta møti áðrenn summarsteðgin.
Sunnumorgunin á familjumøtinum kl. 10.30 talar Johnny í Grótinum og á tilbiðjunarmøtinum kl. 12, talar Jógvan Zachariasen, evnið er: Alt eri eg mentur í Honum.
Barnaansing er fyri børn undir skúlaaldur á báðum møtinum. Sunnudagsskúlin er kl. 12. Drekkamunnur er millum møtini. Byrja verður aftur 10. aug. 2003
Heimasíðan: www.livdin.fo
Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Thabor, Fuglafjørður**
Leygarkvøldið kl. 20.00 verður møti. Føroyingar, sum hava verið við í arbeiðnum í Eliaskirkjuni í Keypmannahavn, skipa fyri.
Sunnudagin verður møti kl. 18, har Gimme Olsen úr Klaksvík talar. Hann greiðir eisini frá missiónsarbeiði í Mali.

**Keldan, Skálafirði**
Leygarkvøldið kl. 21.00: Opið hús.
Sunnukvøldið kl. 19.00: Møti við Osbjørn og Pól Nikláa.
Vælkomin í Kelduna.
www.keldan.fo

**Lívsins Orð**
Møti við breyðbróting verður sunnudagin kl. 10.30.
Mánakvøldið kl. 20.00 verður ungdómsmøti.
Øll eru vælkomin.

**Hvalvíkar missiónshús**
Møti sunnudagin kl. 18.00 við luttøku úr Kollafirði. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Saron, Vestmanna**
Leygardagin kl. 14.00: Brúðarvígsla.
Sunnudagin kl. 11.00: Morgunmøti v/ breyðbróting.
Mánakvøldið kl. 20.00: Bønarmøti.
Telefonandaktin 424741.

**Meinigheitshúsið Sandavágur**
Leygardagin á Vestanstevnu verður opið hús kl. 21 við drekkamunni. "Syngið við" verður kl 22, við luttøku av kendum og fremmandum sangarum og tónleikarum.
Sunnudagin verður útimøti kl. 19.30. við luttøku av Ungdómskórinum úr Vágum, Prayz, Tórfríð Davidsen og Jan Johannesen. Góða Vestanstevnu og vælkomin til tiltøkini.

**Getsemane, Klaksvík**
Sunnudagin kl.11.00 er møti við Sannu Hammer (barnaansing er undir møtinum). Tú ert hjartaliga vælkomin.

**KFUM & K, Klaksvík**
Sunnudagin kl. 14.00 sunnudagsskúli, bønarløta kl. 17.30, møti kl.18.00 við Hanus Simonsen.
Ungdómsmøti kl. 21.00
Øll hjartaliga vælkomin
www.kuff.fo

**Betania, Skopun**
Sunnudagin kl. 11.00: Morgunmøti.
Verið hjartaliga vælkomin.

**Missiónshúsið í Skopun**
Sunnudagin kl. 18.00: Møti v/ Alfred Olsen, Saltnes, o.ø.
Ymiskar sangkreftir luttaka.
Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Missiónshúsið í Porkeri**
Møti verður sunnukvøldið kl. 18.00 við Jacob Poulsen.
Bønarmøti verður onskvøldið kl. 20.00. Øll eru vælkomin.

**Missiónshúsið á Tvøroyri**
Sunnukvøldið kl. 18.00: Møti, Nimrod og Ebba tala og syngja.
Bønarmøti verður hálvan tíma áðrenn møtið.
Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Betel, Vágur**
Sunnudagin kl. 11.00: Breyðbróting, kl.18.00: Evangeliskur fundur, kl. 21.00: Útifundur um viðrar.
Ónsdagin kl. 20.00: Bønar- og uppbyggingarfundur.

**Sion, Vágur**
Sunnudag kl. 11: Morgunmøti, kl. 18 Møti. Øll eru vælkomin.
Mánakvøld kl. 21: Bønarmøti. Frá kl. 21-23 verður bønartænasta á tlf. 373777. Tú ert vælkomin at ringja, um tær tørvar forbøn.

**Frelsunarherurin, Vágur**
Í kvøld kl. 20.00: Bøn- og lovsangsmøti.
Sunnudagin kl. 18.00: Evangeliskt møti við Lív og Oliver Joensen.

**Felagið Tórshavn: Útferð í Sandoynna**
Sunnudagin 13. juli verður gingið: Dalur-Skarvanes-Stóravatn. Farið verður av Gomlurætt kl. 9.45. Leið 101 fer av farstøðini kl. 9.20.
Havið heit og góð gonguklæði og matpakka við. Tilmelding.

**Tilhaldið**
*í Tórsgøtu 21, tlf. 316491*
Opið er mánadag 10.00-18.00. Týsdag-fríggjadag kl. 10.00-17.00.
Drekkamunnur er at fáa hvønn dag, eins og bløðini eru til taks.
**Frá 1. juli til 18. august hava vit opið frá kl. 13.00-17.00.**
Á ólavsøku verður fotoframsýning av útoyggjamyndum í kjallaranum í Tilhaldinum hjá Hjalmari Waag Høgnesen.
Á miðhæddini verður møguleiki at fáa sær ein drekkamunn og okkurt heimabakað.
Tilhaldið hevur átikið sær at hava móttøkuhúsið opið á ólavsøku.
Opið verður 28.-29. juli kl. 15-19.

*Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum – um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.*

**Tilhaldið í Sandoynni**
Tilhaldið er opið mánadag og mikudag frá kl. 14–17.00. Drekkamuður er at fáa báðar dagarnar. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Dagtilhaldið Fløvin**
kemur saman mánadag-fríggjadag kl. 15.00-18.00 í húsunum hjá Kongshavnar Kvinnufelag.

**Reyði Krossur Føroya**
Sorgarlinjan svarar mánadag, mikudag og fríggjadag kl. 19.00-21.00 á tlf. 319630.
Kennir tú føroying í Keypmannahavn, ið hevur tørv á vitjan ert tú vælkomin at seta teg í samband við Reyða Kross Føroya, Bryggjubakki 10, 100 Tórsh. tlf. 319630/61 655400.

**NA (Anomymir narkomanar)**
Reinsaríið, Tórsgøta 5:
Fundur er hvørt sunnukvøld kl. 20.00 til 21.00.

**AA-fundir í Havn**
Reinsaríið, Tórsgøta 5:
Fundir verða leygardagin kl. 17.00–18.00, sunnudagin kl. 11.00–12.00 og mánakvøldið kl. 20.00–21.00.
Heimasíða:
http://heima.olivant.fo/~aa-fo/

**Al-Anon**
Fundur fyri avvarðandi at alkoholikarum er hvørt týskvøld og hóskvøld kl. 20 í Al-Anon, Tórsgøta 5 (inngongd vestanfyri). Telefontíð er fríggja-, leygar-, sunnu- og mánadag frá kl. 19-21 á tlf. 508030.

**ACA**
(Adult children anonymous). Fundur fyri tilkomin, ið eru uppvaksin í alkoholiskum ella dysfunktionellum familjum er hvørt leygarkvøld kl. 20.00-21.30 í Reinsaríinum, Tórsgøta 5, Tórshavn.
www.aca-danmark.dk.
E-mail:
acafaroeislands@hotmail.com
Opin roykfríur fundur fyri øll áhugaði er hvønn sunnudag kl. 16.00-17.00, í Mariukirkjuni, Varðagøta 16.

**AA-fundur í Eysturoy**
Á Toftum hvønn týsdag kl. 20 í húsinum norðanfyri skúlan.
Á Glyvrum hvønn fríggjadag kl. 20 í Hvítaskúla. (gamla læraraíbúðin).

**AA-fundir í Vágum**
Í gamla skúla í Sandavági hvørt hóskvøld og leygarkvøld kl. 19.00 (á loftinum, inngongd niðanfyri).

**Al-Anon í Vágum**
Fundur fyri avvarðandi hjá alkoholikarum er hvørt týskvøld kl. 19.30 í Gamla skúla í Sandavági.

**AA-Suðuroy**
AA-fundirnir í gomlu læknamiðstøðini á Tvøroyri eru fríggjakvøld kl. 19 og sunnudag kl. 15.
Hvønn sunnudag síðst í mánaðinum – opin fundur kl. 15.

**AA í Vági**
AA fundir verða í Undirhúsinum onsdag og leygardag kl. 19.00.

## EITT LJÓS Á GØTU MÍNI

*Tí at um onkur hevur almikið góðs, so stendur tó ikki lív hansara í tí, hann eigur!*

***Luk. 12,15***

Vit mála ofta menniskju eftir, hvussu nógvar pengar og góðs tey eiga. Vit halda, at peningur er atgongdin til alt. Men so er ikki. Vit kunnu ikki keypa lukku og lív fyri pening. Vit kunnu fáa nógv fyri pening; men ikki alt. Tað er ein vandi við at eiga nógv góðs. Vit hava lyndi til at byggja á tað, vit eiga. Vit seta okkara trúgv og álit á mammon. Og tað gera mong menniskju í dag. Men tá vit soleiðis við okkara materialismu verða steðgað upp av sjúku ella deyða, so standa vit hjálparleys. Vit gerast vónbrotin og vit duga ikki at liva við broyttum viðurskiftum. Sjúka og deyði taka grundvøllin undan øllum tí, vit hava »trúð«. Vit verða steðgað upp og missa lívsgleðina. Vit kunnu ikki koma víðari. At seta álit sítt á pening og góðs er ein følsk trúgv. Og henda falska trúgv kann altíð falla saman. Og vit sanna, at okkara trúgv á mammon var ein følsk trúgv. Kristin trúgv lærir okkum at liva undir teimum korum, lívið hevur, so vit ikki flýggja inn í ein óveruligan heim, inn í eina falska trúgv, sum trúgvin á mammon er. Lív og deyði eru lívsins kor. Og fæ og góðs kann ikki geva okkum frið og frelsu, kærleika og vón. Tað kann bara lívsins skapari og harri. Tað er ein verð uttan fyri heimsins lutir, góðs og fæ. Tú verður bjóðaður inn í hesa verð við hvørja gudstænastu. Gev tær tíð at kma. Gev Gudi, trúnni og kærleikanum pláss í lívi tínum. Uttan alt hetta eigur heimurin onga framtíð!
Amen

**David Johannesen**

## 70 ÁR

Í dag, 12. juli, fyllir Poula Johanna Højgaard Andersen, Saltangará, 70 ár. Hon er burturstødd føðingardagin.

Í dag, 12. juli, verður Gunnar Jacobsen í Leirvík 70 ár. Dagurin verður hildin hjá Berg og Karin.

10. juni fylti Jákup Lindenskov í Havn 70 ár. Dagurin verður hildin í Losjuni í Havn leygarkvøldið 12. juli kl. 19.00.

## 60 ÁR

2. juli varð Johnhard Glerfoss 60 ár. Dagurin verður hildin leygardagin 26. juli kl. 19.30 á Føroya Studentaskúla og tá eru øll vælkomin. Sigið frá í seinasta lagi 15. juli á tlf. 315156, 215156 ella 281256.

## SILVURBRÚDLEYP

1. juli høvdu hjúnini Jonny og Gudfinn Olsen, Porkeri silvurbrúdleyp. Í hesum sambandi verður opið hús í heiminum mánadagin 14. juli millum kl. 15-18, har øll eru vælkomin.

## PRÓGV

Á Handilsháskúlanum í Keypmannahavn hevur Dann Jacobsen, Hoyvík, tann 20. juni lokið prógv sum bachelor of science international administration and modern languages.

Dan Joensen á Oyri hevur á Syddansk Universitet í Sønderborg lokið prógv sum elektronikk verkfrøðingur.

23. juni fekk Bertina Lamhauge, Glyvrar, prógv sum pedagogur við Peter Sabroe seminariet í Århus.